Arbeiðs- og brunaeftirlitið heitir á allar kamparar um at hava brunaviðurskiftini í lagi og gera seg kunnugar við trygdarkrøvini fyri kampingøkini, tey eru á.

Á øllum kampingøkjum eigur ein kunningartalva at vera við inngongdina til økið.

**Kunningartalvan eigur at vísa á:**

- At frástøðan millum hvørja kampingeind eigur at vera í minsta lagi 3 metrar.
- At eingin kampingeind má standa innibyrgd, men eigur at kunna flytast til eina og hvørja tíð.
- At rýmingarleiðirnar (til- og frákoyringarvegir) eiga at vera í minsta lagi 5 metur breiðar.
- Hvar sløkkiútgerð er og hvussu hon verður nýtt.
- Aðrar galdandi reglugerðir fyri kampingplássið.

**Mælt verður eisini til at:**

- Tú kunnar teg um trygdarásetingar á kampingplássinum og hvar nærmasta sløkkiútgerð er.
- Tú ikki grillar ov nær kampingeindini ella øðrum, ið kann brenna.
- Tú altíð hevur sløkkiútgerð í nánd og til reiðar, tá ið tú grillar.
- Tú hevur roykvarnara í kampingeindini.
- Tú tryggjar tær, at gassfløskur, slangur og sambindingarliðir eru í góðum standi og verða kannaðir regluliga.